# HETTA SKER SEINASTU TVÆR VIKURNAR

## SKRÁ FYRI DAGARNAR 8.-19. JUNI

fyri **1.s**, **2.s**,
**1. fyr** og **17g**
á Glasi

Góðu næmingar á 1.s, 2.s, 1. Fyr og 17g

Tíðin sum liggur fyri framman verður eitt sindur øðrvísi enn vanligt, og tí er eisini ein serlig skrá gjørd fyri tíðarskeiðið 8. Juni til 19. Juni, sum verður seinasti skúladagur hjá tykkum.

Hesin faldarin sigur frá skránni, eins og tær uppgávur, sum knýta seg til tey ymsu tiltøkini verða lýst.

Vit eru greið yvir, at tit í longri tíð hava siti einsamøll heima við hús orsaka av Korona. Tí ynskja vit, at fyriskipa bæði stuttlig átøk, rørslur av ymiskum slagi, samveru og sang, men vit ynskja eisini at nýta høvi at skipa so fyri, at tit sleppa at eftirmeta fjarlesturin, at skapa møguleikar fyri, at tit kunnu samstarva í flokkunum um kreativar lýsingar av tykkara fjarlesturupplivingum.

Vit fara eisini at nýta høvi at skipa fyrr enn fleiri royndum at mennast innan digitala undirvísing, nevnuliga at gjøgnumføra munnligar royndir á Teams.

Harafturat royna vit eisini at skipa fyri einum góðum og stuttligum endadegi tann 19 juni, har vit fáa høvi at vera sosialt saman.

Vit ynskja tykkum góðan arbeiðshug teir komandi dagarnir.

Vinaliga

Elsa Maria

# YVIRSKIPAÐ SKRÁ:

| | |
|---|---|
| **8. JUNI** | RØRSLA, SAMVERA, SANGUR OG HUGNI |
| **9.- 14. JUNI** | FYRIREIKING TIL ROYNDIRNAR Á TEAMS |
| **15.-16. JUNI** | TEAMS-ROYNDIR |
| **17.-18. JUNI** | KREATIV UPPGÁVA |
| **19. JUNI** | SEINASTI SKÚLADAGUR |

# RØRSLUDAGURIN 8. JUNI 2020

## NÆR OG HVAR?

8. juni verður rørsludagur fyri næmingum og starvsfólkum á Glasi. Øll møta stundisliga til vanliga tíð, kl. 8.10. Inni á tímaglasinum stendur, í hvørjum høli tit skulu møta.

## HVAT

Áðrenn tit fara heimanífrá, skulu tit kanna veðrið og vera í hóskandi klæðum. Vit fara at vera úti, og nógv av tíðini skulu vit ganga í bønum. Havið eisini matpakka og drekkidunk við til túrin.

## HVUSSU?

Eftir kunning á skúlanum fara allir flokkar saman við einum tilskilaðum lærara út at finna postar við uppgávum. Allar uppgávur koma digitalt á eina telefon hjá einum næmingi í flokkinum. Uppgávan kemur fram, tá telefonin er innan fyri ein ávísan radius av staðnum, har tit skulu vera.

Fríggjadagin fara tvey umboð úr flokkinum á fund við rørsludagsnevndina fyri at fáa serliga kunning. Vit heita á tykkum áðrenn.

Matarsteðgur verður á túrinum, og tá verður ikki gjørligt at loysa nakra uppgávu.

## NÆR FAA VIT FRI?

Kl. 13.30 endar postarenningin, og vit hittast á Glasi til nýbakaðar bollar og kakao. Eftir eina løtu verður vinnari av postarenningini funnin og **vinningurin verður latin.**

# ROYNDIR Á TEAMS 15. OG 16. JUNI

**FYRIREIKING:** Í døgunum 9.-14. juni fyrireika tit tykkum til royndirnar, sum verða á Teams. Hendan fyrireikingin verður heima við hús. Tit fáa nærri boð frá læraranum, sum skal føra tykkum upp á Teams, um hvat tit skulu upp í, og hvussu hetta verður gjørt.

**DIGITALAR MUNNLIGAR ROYNDIR FYRI 1.S, 1.FYR OG 2.S ER A NÆSTSU SÍÐU**

Lærarin avgerð, hvussu royndin fer fram. Tit kunnu vænta, at royndirnar eru ymiskar frá flokki til flokk. Partur av endamálinum er at venja tykkum at fara til próvtøku. Hin parturin er, at lærarar eisini fáa venjing í at føra næmingar upp í digitalari roynd á netinum.

# DIGITALAR MUNNLIGAR ROYNDIR FYRI 1.S, 1.FYR OG 2.S

| FLOKKUR | ROYND | LÆRARI | FLOKKUR | ROYND | LÆRARI |
|---|---|---|---|---|---|
| 18a | SPA-A | RAM | 18z | FØR-A | MOV |
| 18b | SØG-A | OAL | 18ø | SØG-A | ANF |
| 18ð | SØG-A | GUI | 18m | FØR-A | ATO |
| 18e | SPA-A | SOJ | 18n | FØR-A | TJO |
| 18u | LÍF-A | UNM | 18o | FØR-A | PAE |
| 18v | SØG-A | HAM | 19p | FØR-A | SMK |
| 18x | FØR-A | VTR | 19q | FØR-A | PGU |
| 18y | SØG-A | SEI | | | |

| FLOKKUR | ROYND | LÆRARI | FLOKKUR | ROYND | LÆRARI |
|---|---|---|---|---|---|
| 19a | ENS-A | EDJ | 19z | STØ-B | TED |
| 19b | SPA-A | MRH | 19ø | ENS-B | SAS |
| 19ð | ENS-A | RAJ | 19k | SØB-B | JPH |
| 19u | ALF-B | HAA | 19m | VIB-B | HHL |
| 19v | LÍF-C | ARJ | 19n | VIB-B | HOO |
| 19x | ALF-B | PBA | 17g | SØG-A | ANS |
| 19y | ALF-B | JFM | | | |

# SPURNARBLAÐ – EFTIRMETING AV FJARLESTRINUM

Spurnarkanningin skal svarast hósdagin 17. juni í 1. blokki (áðrenn kl 9.00!).

Vit ynskja at fáa tykkum næmingar at eftirmeta fjarlesturin, sum var orsakað av Covid-19, har vanliga undirvísingin var niðurløgd og fjarlestur settur inn ístaðin.

Tað er uttan iva ymiskt, hvussu tit næmingar hava upplivað fjarlesturin. Tað er uttan iva eisini ymiskt, hvussu tit hava upplivað undirvísingina í teimum ymsu lærugreinunum. Tí verða hesir 7 spurningar settir, sum tit skulu svara upp á í mun til tær lærugreinar, sum tit hava.

- *Eg havi fingið nógv fakligt burturúr fjarundirvísingini*
- *Teams hevur virkað væl í mun til læring*
- *Skrivliga arbeiðstrýstið hevur verið nøktani*
- *Eg eri sloppin nóg væl framat munnliga at vísa, hvat eg dugi*
- *Mítt samband/samskifti við læraran hevur verið nøktandi*
- *Eg havi fingið meira burturúr fjarlestri enn í vanligari undirvísing*
- *Fjarlestur átti at blivi partur av undirvísingini framyvir*

Tit fáa 5 møguleikar at svara hesum spurningum:

- *Sera samd/samdur*
- *Samd/samdur*
- *Miðal*
- *Ikki samd/samdur*
- *Als ikki samd/samdur*

Spurnarkanningin verður send tykkum umvegis teldupost. Í teldupostinum, finna tit eisini lærugreinar, sum tit ikki hava. *Tað er av stórum týdningi, at tit ikki svara/fylla út fyri hesar lærugreinar, men bert tær, sum tit hava á Tímatalvu tykkara.* Í teldupostinum við spurnarblaðnum fáa tit leiðbeining um, hvussu tit senda spurnarblaðið inn aftur.

Ætlanin er at fáa lærarnar at svara somu spurningum, so vit fáa samanborið upplivingarnar hjá næmingum og lærarum.

Hetta er ikki ein vísindalig kanning, men hon kemur at geva okkum eina mynd av tykkara upplivingum av fjarlestrinum.

# KREATIV UPPGÁVA – EIN LISTARLIG LÝSING AV TYKKARA UPPLIVING AV FJARLESTRINUM (17.-18. JUNI)

Í einari roynd at vera kreativ í okkara reflektiónum um fjarlesturin, verður skipað fyri, at tit sleppa at gera 1 film pr flokk, sum lýsir tykkara upplivingar av fjarlestrinum. Tit standa sjálvi fyri allari framleiðsluni og krevur tað tí samstarv innanhýsis í flokkinum. Hendan uppgávan at framleiða ein film verður fyriskipað soleiðis:

## KAPPING

Orsaka av korona bleiv skúlaárið ikki soleiðis, sum væntað. Part av árinum hava tit merkt avleiðingarnar av at samfelagið í stóran mun lat aftur.

Sosiala lívið varð sett á pausu og skúlalívið bleiv til fjarundirvísing.
Samfelagið er so smátt við at lata upp aftur og tit eru sloppin aftur í skúla. Tað er tó ein sannroynd, at tit hava upplivað ein heim í undantaksstøðu, og tí hevur tað týdning fyri nútíð og framtíð, at tit skjalfesta hetta søguliga tíðarskeið.
Glasir hevur valt, at hetta skal gerast sum ein kapping millum allar 1. og 2. árs næmingar.

## ENDAMÁL:

- At skúlin fær dokumentatión um korona-tíðina, soleiðis sum tit sum næmingar hava upplivað hana.
- At vera saman sum flokkur og gera eitt felags avrik.

## UPPGÁVUORÐING:

- Lýs tíðina við fjarundirvísing, tak við fyrimunir og vansar.
- Set "korona-tíðina" í eitt søguligt høpi og met um, hvat vit hava lært av hesi tíð.

## KRØV TIL UPPGÁVUNA:

- Tit arbeiða sjálvstøðugt sum flokkur. Lærari er ikki knýttur til flokkin.
- Hetta er ein heimauppgáva tvs. tit skulu ikki inn á skúlan at loysa uppgávuna.
- Í hvørjum flokki skal vera ein ábyrgdarpersónur, ið virkar sum toghaldari, og ein persónur, sum hevur ábyrgd av tekniska partinum. Flokkurin velur hvørji hesi skulu vera.
- Allur flokkurin skal vera virkin og hetta skal síggjast aftur í avrikinum.

- Avrikið skal vera ein filmur á í mesta lagi 3 min. sum skal sendast til ein kt-pall hjá Glasi.
- Umframt at svara uppgávuorðingini skal navn á flokkinum vera við á filminum og ein stutt lýsing av arbeiðsgongdini.
- Innihaldið í filminum kann vera tekniseriur, samrøður, yrkingar, tekningar/málningar/myndir, sangir, leikir, rolluspøl, røður við meira, bert hugflogið setir mørk!
- **Filmurin má ikki vera persónligur mótvegis næmingi ella lærara.**
- Seinasta freist at senda filmin inn er 18. Juni kl. 14:00. Leiðbeining um, hvussu tit lata inn, verður send út í sambandi við uppgávuna.

## FILMARNIR VERÐA DØMDIR EFTIR:

- Hvussu uppgávan er loyst/spurningarnir svaraðir
- Hvussu innhaldið í filminum er miðlað
- Kreativiteti og fakligheit
- Ein dómsnevnd velir 10 teir bestu filmarnar burturúr. Hesir verða vístir øllum næmingunum 19 juni.

19 juni kl. 9:00 møta øll í skúlanum til morgunmat og filmssýning. Flokkarnir atkvøða síðani fyri besta filmin.

## VINNINGUR:

- Filmur nr. 1, 2 og 3 verða lagdir á heimasíðu skúlans.
- Vinnaraflokkarnir fáa døgurðakort úr kantinuni.

Góðan arbeiðshug og takk fyri tykkara ískoyti til heimssøguna!

# SEINASTI SKÚLADAGUR – 19. JUNI

Skráin fyri seinasta skúladag, tann 19. juni:

**Kl 10.00** Møtt verður stundisliga í flokkshølinum (sambært tímatalvu)

- *Morgunmatur í flokkshølinum. 1-2 næmingar heinta tykkara morgunmat í kantinuni og bera hann upp í flokkahøli.*
- *Meðan tit hugna og eta morgunmat, hyggja tit eftir 10 teimum bestu kreativu filmunum um fjarlesturin, sum eru úttiknir av dómsnevnd. Tit skulu velja 3 teir bestu burturúr.*
- *Filmvinnarin fær eina góða gávu (og tað er ikki tann, sum stendur í uppgávulýsingini!)*

**Kl. 11.15** Felagssangur á Svalunum.

**Kl. 11.30** Røða á 3 hædd. Næmingarnir verða verandi á Svalanum.

**Kl. 11.45** Næmingaframførsla - tónleikur

**Kl. 12.00** Tónleikabólkur spælir (nærri verður kunnað, hvør bólkurin verður)

**Kl. 12.45** Næminga-kabarett í Marghøllini. Tit fáa nærri at vita, hvussu hetta verður fyriskipað í mun til leiðreglurnar fyri smittuvanda.

Møguleiki verður at síggja allir næmingafilmarnir í Marghøllini aftaná Kabarettina.

**Kl. 13.00** Grillað verður uttanfyri.

**Kl. 14.00** Skúlaárið endar.

GLASIR